
Mynd: dr.dk

# Ætlanir um at avmarka koltvísúrni er ikki nóg mikið

**Beinta Poulsen**

04.05.2015 - 18:36

Oljan.fo

USA, Kina og Evropa skulu hava fleiri stórar dreymar, um veðurlagsbroytingarnar skulu haldast aftur, ljóðar ávaringin í nýggjari frásøgn hjá FN.

Hóast fleiri positivar váttanir um at minka útlat teirra av koltvísúrni, eru lyftini hjá ymisku londunum ov úrslitalítil, og hetta vil ikki steðga altjóða upphitingini nóg mikið, ávara granskarar í dag. Soleiðis skrivar tíðindastovan AFP.

Útlátið av koltvísúrni kann møguliga koma heilt upp á 57-59 milliardir tons, um lond ikki fylgja ætlanum teirra meira nágreiniliga.

Um hetta ikki verður broytt, kann altjóða upphitingin hækka upp ímóti 4,8 stigum, ið hevur tær avleiðingar, at tað vil skapa stórar náttúruvanlukkur, vatnføri og tað, at sjóvarmálin hækkar í høvunum kring knøttin.

Størstu syndarar innan koltvísúrnisútlát eru USA, Evropa og Kina. Tilsamans fara hesi nevndu at veita heili 20,9 – 22,3 milliardir tons av koltvísúrni í 2030, meðan onnur lond í heiminum hava atlit til at veita burtur 35 milliardir tons av koltvísúrni í 2030, sambært granskarum.

Sum nú er hava EU-londini saman við USA, Russlandi, Norra, Meksiko, Gabon, Andorra, Liktinstein og Sveis borið ætlanir teirra fram, um hvat tey fara at gera, fyri at skerja niður um koltvísúrni.

Millum annað hevur Kina, ið hevur skyldu í 25 prosentum av alheimsins koltvísúrna útlátinum, ikki enn borið fram lyfti síni um at minka um útlát teirra.